# Føroysk gransking fær vi›urkenning í USA

**Ein óheft nevnd av amerikanskum vísindafólkum hevur nú vi›ukent úrsliti › av føroysku kyksilvurkanningunum**

GRANSKING
*Áki Bertholdsen*

Føroysk gransking hevur nú fingi› eina t‡›andi vi›urkenning í USA.

Ta› hendir, nú ein óheftur bólkur av vísindafólkum alment hevur vi›urkent úrsliti› av kyksilvurkanningunum, sum vór›u gjørdar av føroyskum børnum fyri nøkrum árum sí›ani.

Pál Weihe, sum var ein av oddamonnunum í hesi granskingarverkætlanini, sigur, at hetta er ein vi›urkenning, sum hann er sera fegin um.

Útgreiningin og ni›urstø›an hjá amerikanska vísindabólkinum er prenta› í eini bók, sum er yvir 300 bla›sí›ur.

Og ni›urstø›an er í stuttum, at føroysku kyksilvurúrslitini eiga at vera grundarlagi› fyri, hvussu nógv kykslivur kann vera í tí, vit eta.

Pál Weyhe sigur, at ta› sum er hent vi› føroysku kyksilvurgranskingini minnir hann um ta›, sum fór fram, tá i› kanningar av bl‡ggi vór›u gjørdar.

– Ta› hev›i leingi veri› kunnugt, at bl‡ggj í stórum nøgdum var ska›iligt.

– Men ta› bleiv eitt ramaskríggj, tá i› granskarar vístu á, at bl‡ggj í smáum nøgdum hev›i ska›ilig árin á mannaheilsuna.

Granskarar vístu á, at ta› skuldi ikki meiri bl‡ggj til at ávirka heilsustø›una til ta› verra, enn ta›, sum enda›i í luftini av tí, at bilar brúktu bensin. Ta› tók nógv ár at fáa úrsliti› vi›urkent.

*Føroysku kyksilvurkanningarnar hava nú fingi› ta› bláa stempli› í USA og ta› er Pál Weihe serstakliga fegin um*

Pál Weihe sigur, at ídna›urin í USA hevur eisini veri› avbera trekur av vi›urkenna úrsliti› av føroysku kyksilvurkanningunum og í fleiri ár hevur hann gjørt sítt ítarsta fyri at mótprógva kanningini.

– Hetta hevur sett amerikanskar myndugleikar í eina tvístø›u.

– Amerikanska heilsust‡ri› hevur vilja› havt fleiri kanningar. Hinvegin hava umhvørvismyndugleikarnir tiki› kanningarnar í størri álvara.

– Ta› enda›i vi›, at kongressin gjørdi av at seta eina nevnd av óheftum vísindafólkum at meta um kyksilvurmáli› sum heild og at gjøgnumganga tær kanningar, sum eru gjørdar á økinum.

Pál Weyhe sigur, at hetta arbei›i› hevur tiki› tvey ár. Men ni›urstø›an er, at úrsliti› av føroysku kanningunum er fullgott prógv fyri, hvussu ska›iligt kyksilvur er, og at markvir›i› fyri, hvussu nógv kyksilvur kann latast í natúruna, eigur at lække samsvarandi.

Hann sigur, at taka amerikanarar avlei›ingar av tí, fer ta› at føra stórar broytingr vi› sær. Eitt nú, noy›ast teir at avmarka kyksilvuri›, sum índa›urin letur í nátúruni. Somulei›is eiga teir at koma vi› eini kostveglei›ing, sum fer at avmarka n‡tsluna av eitt nú tun- og svør›fiski.

Hann leggur afturat, at hetta setir okkum í eina sterka stø›u, tí vit hava ikki trupuleikar í so máta av okkara fiski.

– Men tess meiri ney›ugt er ta›, at vit var›veita okkara umhvørvi› ódálka›.

# Tórshavnar B‡rá› ætlar at keypa Marinustø›ina

**- Ætlanin er at brúka hana til okkurt endamál á eldraøkinum, antin til ellisheim, til samb‡li, ella okkurt anna› í tí sambandinm**

ELDRAØKI‹
*Áki Bertholdsen*

Um eini tvey, tr‡ ár ver›ur Marinustø›in í Havn kanska ellisheim. Í Hvussu so er hevur ætlar Tórshavnar B‡rá› at vita, um ta› ikki er møguleiki at keypa Marinustø›ina.

Eftir, hvat skilst á keldum, sum vit hava tosa› vi›, er ætlanin hjá B‡rá›num at brúka Marinustø›ina til okkurt endamál á eldra-økinum.

Hon kann antin gerast til ellisheim, til eldrasamb‡li, til røktarheim, til dagtilhald, ella til eitt heim til fólk í barndømi, ella til okkurt anna› innan eldraøki›.

Hildi› ver›ur, at Marinustø›in er avbera væl hóskandi til endamáli›.

Fá hús liggja so væl fyri í Havnini, sum Marinustø›in vi› Hoyvíksvegin. Hon liggur mitt í Havnini, men tó sera frítt fyri á einum stórum stykki, beint vi› Hoyvíkstjørn. Sjálvt grundstykki› er einar 6.000 fermetrar stórt, men so liggur alt fríøki› vi› Hoyvíkstjørn uppat.

Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur í Havn, vil ikki gera stórvegis vi›merkingar til máli›.

Men hann váttar tó, at Tórshavnar B‡rá› liggur framvi› at ogna sær Marinustø›ina. Og hann sigur eisini, at B‡rá›i› er so áhuga› í marinustø›ini, at ta› er sinna› at strekkja seg langt fyri at fáa fatur á henni.

Men hann vil ikki siga naka› um, hvat B‡rá›i› ætlar at brúka hana ti, um ta› eydnast at keypa hana

*Marinustø›in liggur avbera væl fyri mitt í Havnini og hon hevur eitt stórt fríøki rundanum. Um tvey ár ver›ur hon til sølu. Tá fer eisini Tórshavnar B‡rá› at bjó›a uppá ognina*

## Til sølu um tvey ár

Ta› er í øllum førum greitt, at Marinustø›in ver›ur til sølu um eini tvey ár.

Ætlanin er, at Færøernes Kommando vi› Hoyvíksvegin og Flyvestation Thorshavn í Mjørkadali skulu leggjast saman.

Ætlanin er, at bá›ar stø›irnar skulu ver›a ver›a lagdar saman 1. januar 2001, tvs. um ein gó›an mána›a ár.

Sí›ani er ætlanin at byggja um í Mjørkadali. Tann umbyggingin ver›ur væntandi li›ug á sumri 2002 og tá skal manningin á Marinustø›ini flyta ni›an í Mjørkadal.

– Tá útbyggingin er li›ug, ver›ur Marinustø›in í Havn l‡st til sølu og hon ver›ur seld hægstbjó›andi, sigur Eli Lyngvej Larsen, sum er tí›indatalsma›ur á Marinustø›ini.

## Fáa kapping

Men ta› skilst eisini, at B‡rá›i› fær kapping í royndunum at ogna sær Marinustø›ina.

Ta› er Forsvarets Bygningstjeneste, sum selur ognina.

Og ta› frættist, at í hvussu so er Fútin og politii› eisini ætla at fáa fatur Marinustø›ina, tí ætlanin er at brúka hana til skrivstovur og umsiting.

Ta› eydna›ist ikki at fáa hettavátta›, tí hvørki fútin, ella nakar annar, sum kundi siga naka› um máli›, vóru at hitta, á›renn bla›i› fór til prentingar.



# M‡s á Landssjúkrahúsinum

**Í løtuni eru m‡s á Landssjúkrahúsinum. Umsjónarma›urin metir tó ikki, at talan er um nakran trupulleika**

M‡S
*Jákup Mørk*

Seinastu tí›ina hevur naka› av tosi› veri› at hoyrt um, at tey á Landssjúkrahúsinum í Havn hava havt trupulleikar av m‡s.

Spurdur um hetta er rætt, hevur umsjónarma›urin á Landssjúkrahúsinum, Jógvan Elias Thomassen, bestan hug at flenna.

– Ta› veit eg ikki, um ta› er nakar trupulleiki. Ta› kemur av og á fyri, at m‡s eru hjá okkum, og so ver›a fellur settar upp. Eftir eina tí›, eru tær so burtur, men av og á koma tær so aftur í aftur, sigur hann, og leggur afturat, at har m‡s eru, eru so ikki nakrar rottur.

– Júst hvar tær koma frá, er ilt at siga. Ta› kann vera so ymiskt. Kanska gjøgnum okkurt rør ella tílíkt, men ta› er so ikki naka›, sum vit hava sta›fest.

Spurdur, um hann sær nakran heilsuvanda fyri umhvørvi› á Sjúkrahúsinum í hesum, sigur Jógvan Elias, at ta› ger hann ikki.

– Nei. So avgjørt ikki. Tær m‡s, sum vit hava lagt til merkis, hava ongantí› veri› í køkinum, ella vi› stovurnar. Onkuntí› hevur onkur veri› at sæ› á goymsluni, og onkuntí› í kjallaranum, men ikki a›rasta›ni. Til tess eru tær alt ov styggar, sigur hann.

Heldur ikki metir hann, at talan hevur veri› um nakrar ska›ar av m‡snum, sum hava veri›.

– At m‡s eru at síggja, kann koma fyri allasta›ni. Ta› kann kanska ljó›a eitt sindur ógvusligt, tá hetta er á einum sjúkrahúsi›, men sum sagt, so haldi eg ikki, at talan er um nakran trupulleika.

*Stø›an vi› m‡snum í høvu›ssta›num er á lei› hin sama, sum hon hevur veri› seinnu árini, sigur aktingarma›urin hjá kommununi*

## Ikki meira enn vanligt

Hóast Landssjúkrahúsi› sostatt sjálvt tekur sær av teimum m‡s, sum tey síggja í hølunum, so kemur eisini fyri, at bo› ver›a send eftir hjálp, tá lítla ska›adjóri› ger um seg.

Jónleif Sólsker er aktingarma›ur hjá kommununi. Spurdur, um hetta vi› at m‡s gera um seg er serliga nógv frammi nú, svarar hann, at ta› heldur hann ikki.

– Okkurt er sjálvandi, men ikki meira enn ta› hevur veri› seinnu árini.

Spurdur um, hvørt ta› er vanligt, at m‡s gera nógvan ska›a, har tær eru, svarar hann, at ta› kann koma fyri.

– Ta› er sjálvandi eitt ska›adjór, sum kann gera um seg, men ta› plagar ikki at vera ta› stóra. Ta› kann henda, at tr hava gnadda onkran leidning av, og í ringasta føri kann hetta vi›føra eldsbruna, men vanliga er ska›in ikki hin stóri.

Um stø›una á Landssjúkrahúsinum sigur aktingarma›urin, at hetta hevur hann sum so einki vi› at gera. Hann sigur, at teir onkuntí› hava keypt naka› av músaeitri frá b‡rá›num, men at hann so avgjørt ikki metir, at teir eru ta›, ein kundi rópt stórn‡tarar.

# Sey›ahundarnir aftur í Kollfjar›ardali

LANDBÚNA‹UR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Kollafjør›ur:** Komandi sunnudag klokkan 13:30 ver›ur aftur sey›ahundakapping vi› Landbúna›ardepilin í Kollfjar›ardali. Hesufer› ver›ur talan um tvær kappingar, eina fyri yngri og óroyndar hundar og ein fyri eldri og meira royndar hundar.

Tríggir teir bestu hundarnir í yngra bólkinum sleppa at kappast vi› hundarnar í betra bólkinum.

– Áhugin fyri sey›ahundum er stórur. Kappingarnar er bara tann sosiali parturin av okkara virksemi. Sjálvur havi eg veri› á 16 fjøllum í ár og okkara felag hevur ikki færri enn 100 limir vi› 150 hundum, sigur Absalon Hansen, sum er oddama›ur fyri felagnum.

– Sunnudagin hava vit fingi› ein professionellan dómara. Ta› er danin Per Berg Jacobsen frá Dansk Hyrdehundeklub, sigur Absalon Hansen.

*Hendan myndin var› tikin tá seinasta kappingin var› hildin í Kollfjar›ardali fyri gó›um mána›i sí›an*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# »Krypilin« – tríggjar fer›ir afturat!

Í vikuskiftinum l‡sti leikhúsi› Gríma vi› seinastu s‡ningunum av sjónleikinum »Krypilin úr Inishmaan«. Men eftirspurningurin eftir atgongumerkjum var so stórur, at tey hava avgjørt at hava nakrar eykas‡ningar hesa vikuna – og tann fyrsta er longu útseld!

»Krypilin úr Inishmaan« eftir írska høvundan Martin McDonagh, sum leikhúsi› Gríma hevur framført í ein gó›an mána› nú, hevur veri› øgiliga væl dámdur, bæ›i í blø›unum og úti millum fólk, og ummælararnir n‡ttu stór or›:

*Føroyar eru kanska ikki so galnar, tá so dugnaligir sjónleikarar tíma at búgva her (…) hesin sjónleikurin ER verdur at skræ›a seg leysan til. (Ingi Rasmusen, Dimmalætting) Leikurin var› førdur á sera høgum stø›i (…) onki var› lati› upp í hendurnar á tilvildini (Oddfrí›ur M. Rasmussen, Sosialurin). Krypilin úr Inishmaan eigur at ver›a sæddur. (Jústines L. Eidesgaard, Sosialurin).*

Leikurin um lítla oyggjasamfelagi› á vesturstrond Írlands, hevur eftir øllum at døma stóran áhuga millum føroyingar, og Meiaríi› hevur eisini veri› hampuliga væl vitja› henda gó›a mána›in, hann hevur gingi›. Og nú, tá i› seinastu s‡ningarnar vór›u l‡star, var rættiligur gravgangur eftir atgongumerkjum, so onkur noyddist til hús aftur. Sum so ofta fyrr, so er ta› mest líkt til, at tey flestu vilja bí›a til sí›stu løtu – og av tí sama ver›ur so onkur vi› svi›i› so›!

Gríma gjørdi so av at hava eina eykas‡ning hósdagin 9. november, sum næstan beinanvegin eisini var útseld, so tí fáa tey sum enn ikki hava havt høvi› til at leita sær oman á Gamla Meiaríi› ein sí›sta møguleika. »Leygardagin 11. og sunnudagin 12. november kl. 16.00 ver›a so avgjørt seinastu s‡ningarnar av »Kryplinum úr Inishmaan« – so tey sum ætla sær, og enn ikki hava fingi› upp í lag at sæ› leikin mugu liggja framvi›!

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni tlf, 315788 og á Meiarínum tlf, 318617 eina tíma á›renn s‡ning.

## Petri aftur í Føroyum

Michala Petri og Lars Hannibal eru aftur á fer›. Tey hava tvær konsertir í skúlanum á Glyvrum leygardagin 11. nov. kl. 16.00 og í Nor›urlandahúsinum sunnudagin 12. nov. kl. 16.00.

Michala er ein konsertsolistur á altjó›a stø›i og ein av teim fáu á slíkum kaliber sum vit fáa hendanvegin. Kanska tí at fa›ir hennara Kanny Sambleben er búsitandi í Føroyum.